VIÐMERKINGAR

# Fílabeinstornið í Sortudíki



**Jóanes N. Dalsgaard**

Tað rennur rættiliga upp hjá útvarpsstjóranum í Dimmalætting hósdagin 22. mars. Tað er eitt lesarabræv hjá mær í Dimmalætting 16. mars, sum hevur fingið ilt í hann. Í lesarabrævinum fanst eg at einum innslagi í einum útvarpstíðindum, sum eg helt vera villleiðandi. Grækariasmessudag bar útvarpið tey tíðindi, at hægstirættur broytti triðja hvønn dóm hjá eystara landsrætti. Hetta vóru orðini. Um tíðindini vóru sonn, høvdu tey sanniliga verið órógvandi. Men tíðindini vóru tíbetur ikki sonn. Sannleikin var, at av teimum eystara-landsrættardómum, sum kærdir vóru fyri hægstarætt, var triði hvør dómur broyttur. Hetta er nakað heilt annað enn tað útvarpið segði. Talan er um ein mun uppá góðar 1600 dómar. Av uml. 1700 dómum hjá eystara landsrætti vóru færri enn 100 kærdir til hægstarætt. Tað var sostatt skeivt, tá útvarpið segði, at hægstirættur broytti triðja hvønn dóm hjá eystara landsrætti. Sjálvt útvarpsstjórin má kunna geva mær rætt í, at munur er á 1/3 av 1700 og 1/3 av 100.

Í svari sínum ger útvarpsstjórin nógv burturúr at viðgera sinnistøðu mína, umframt at hann hevur hug at arga eitt sindur. M.a. heldur hann tað vera eitt sindur láturligt av mær, í lesarabrævinum at greina hvussu danska rættarskipanin virkar. Hetta vita øll(?!), sigur útvarpsstjórin. Víðari heldur útvarpsstjórin uppá, at útvarpið eingi skeiv tíðindi hevur borið. Hann undirbyggir hetta við, at tíðindini vóru ein endurgeving av eini grein í danska blaðnum Politiken, og at danska útvarpið eisini hevði borið tíðindini. Niðurstøða hansara er tí, at lurtarin (undirritaði) hevur miskilt tíðindini hjá útvarpinum tí at hann »ikki hevur lurtað nóg væl eftir«. Í øðrum lagi tykiskt umberingin at vera, at hevur útvarpið sagt ósatt, so er tað tí at Politiken og Danmarks Radio hava sagt ósatt. »Lúgva vit, so er logið fyri okkum«.

Svarið frá útvarpsstjóranum er ikki sørt órógvandi, eisini um vit síggja burtur frá, at tað leggur ein himmalrópandi mangul uppá professionalismu fyri dagin. Tað, sum útvarpsstjórin týðuliga boðar frá er, at lurtarin er til fyri Útvarp Føroya og ikki øvugt. Og er tað ikki eitt sindur øvugt?!

Eg lurtaði væl eftir tíðindunum grækarismessudag, og hvørja ferð tíðindini um landsrættardómarnar vóru lisin, hoyrdi eg somu villuna. Tí dittaði eg mær til at sláa uppá tráðin til útvarpið henda dagin, men fekk tá somu boðini, sum eg seinni fekk frá útvarpsstjóranum. Í staðin fyri at taka atfinningarnar til eftirtektar, og royna at siga tingini greiðari, so tvíheldur útvarpsstjórin um, at alt er sum tað skal. Eg havi eina samfelagsfrøðiliga útbúgving, og visti eg tí beinanvegin at hesi tíðindini vóru skeiv. Men útvarpið ber so nógv onnur tíðindi, um viðursskifti, sum eg lítlan ella ongan kunnleika havi til. Hví skal eg taka tey tíðindini fyri fult, tá eg havi prógv fyri hvussu lítið trúðvirðið tíðindaflutningur útvarpsins kann hava?

Útvarpsstjórin heldur tað hava týdning fyri málið, at eg var vorðin »firtin« av tíðindunum. Nú liggur tað ikki til mín at gerast firtin, men annars haldi eg tað vera málinum fullkomiliga óviðkomandi. Spurningurin er nógv meira djúptøkin og álvarsligur enn so. Spurningurin snýr seg um, hvørt føroyingar kunnu líta á, at tey tíðindi vit hoyra í útvarpinum eru eftirfarandi og viðkomandi ella ikki. Høvuðsgrundgevingin fyri at tað almenna skal reka fjølmiðlar er júst tørvurin á viðkomandi og eftirfarandi upplýsing um tað, sum hendir og rørir seg í samfelagnum. Tað er vandamikið fyri demokratiið, um fólk eru óupplýst, men hvaðna verri er um tey eru feilupplýst.

Nú kann tað vera, at onkur heldur at hetta er at gera nakað nógv burturúr einum einstøkum tíðindastubba. Tað hevði tað ivaleyst eisini verið, um útvarpið annars bar eftirfarandi og viðkomandi tíðindir. Men so er ikki. Herfyri bar útvarpið tey tíðindi, at íslendska Altingið hevði »avtikið verkfallsrættin hjá íslendskum fiskimonnum«. Tíðindi vóru beinleiðis ósonn og villleiðandi, tí talan var sjálvandi ikki um at myndugleikarnir í brøðratjóð okkara fyri vestan høvdu gjørt seg inn á grundleggjandi mannarættindi. Talan var um, at Altingið, eins og Løgtingið so ofta hevur gjørt, hevði steðga einum verkfallið við lóg. Verkfallsrætturin er sostatt tann sami í Íslandi, sum hann hevur verið tað í mannaminni.

Eitt annað dømi er, tá tíðindaflutningurin er kryddaður við fullkomiliga óviðkomandi upplýsingum, sum kunnu vera við til at geva lurtarunum eina skeiva fatan av, hvussu heimurin sær út. Herfyri bar útvarpið tey syndarligu tíðindini um, at enn ein ungdómur í USA hevði gjørt feigdina um seg á einum skúla, har hann hevði skotið frá hond. Tíverri hava vit í seinastuni ofta hoyrt slík tíðindi úr USA, men hesaferð helt tíðindaupplesarin tað vera týdningarmikið at vit vóru kunnaði um húðalit brotsmansins. Í hesum førinum visti útvarpið, at talan var um ein littan drong. Og hvat so?! – kunnu vit spyrja. Verður sorgarleikurin størri ella minni tess vegna? Ella er talan um at blása til onkran fordóm um, at ikki-hvít menniskju eru vandamiklari enn vit hvítu? Ella hví var viðmerkingin um húðalitin á brotsmanninum viðkomandi – relevant? Svar ynskist.

Kanska svarar útvarpsstjórin enn einaferð, at talan er um misskiljingar, tí at lurtarin (tað eru fleiri við mær, sum eru ørkymlað) ikki lurtar nóg væl eftir. Men kann útvarpsstjórin lata eyguni aftur fyri, at fólk javnan misskilja tey tíðindi, sum útvarpið ber? Well, tað kann gott vera at vit øll eru býtt – uttan útvarpsstjórin og hansara fólk sjálvandi. Men var tað so kanska ikki uppá sítt pláss, at útvarpsstjórin við fylgið kreyp niður úr fílabeinstorninum í Sortudýki og í eygnahædd við lurtaran royndi at lýsa veruleikan sum hann er rundan um okkum, á ein hátt, so at vit býttu lurtarar, sum lurtað so illa eftir, kortini skiltu tey klóku orðini úr erva?

# Andstøðan má standa saman

**Lisbeth L. Petersen**
*Løgtingslimur*



Uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks segðist vera ein fella fyri andstøðuna, tí henda fór ikki at kunna atkvøða ímóti fyrsta setningi í uppskotinum, har tikið verður soleiðis til:

*Ásannandi, at Føroya fólk er ein tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti, tekur Løgtingið undir við, at farið verður undir eina miðvísa fullveldisætlan o.s.fr.*

Hetta skuldi vera fellan, sum tey vildu leggja fyri andstøðuna, men so lætt gongur ikki !

Vit í Sambandsflokkinum eru als ikki í iva um, hvør okkara støða er, tí vit meta okkum sum eina tjóð, og vit eru ikki í iva um, at vit eisini eru fræls, hóast serstakliga landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum hevur roynt at prenta niður í okkum, at ongin, og als ikki danska stjórnin, metir okkum sum eina tjóð ella sum eitt fólk, men uppskotinum kunnu vit ikki taka undir við.

### Uppskotið

Hyggja vit eftir hvussu nógv mál skulu yvirtakast eftir stutta tíð, so eru tey samb. uppskotinum 24!

Í seinasta lagi hin
1. januar 2002, 10 mál.
Í seinasta lagi hin
1. januar 2004, 5 mál.
Í seinasta lagi hin
1. januar 2006, 7 mál,
og í seinasta lagi hin
2. januar 2008, 2 mál.

So skal farast undir at rinda fyri yvirtikin mál undir føroyskum málsræði, og heildarveitingarnar til Føroya úr danska ríkiskassanum skulu lækka umleið 300-400 mió. kr. í seinasta lagi hin 1. januar 2002, og síðan verða tær lækkaðar, til tær eru burtur.

Hugsa vit so um, hvussu umstøðurnar eru hjá teim stýrum, sum vit hava í dag, so hoyra vit javnan um, hvussu trupult tað er hjá teimum at loysa tær uppgávur, sum tey hava fingið álagt undir verandi umstøðum. Kunngerðir eru ikki tilevnaðar, sum skulu fylgja teim lógum, sum longu eru samtyktar. Bara eitt dømi er Almanna- og Heilsumálastýrið, ið ikki hevur manning til at fylgja málum upp, so lógirnar kunnu virka.

Almennu starvsfólkini arbeiða dagliga undir einum øgiligum trýsti, tí politiski viljin krevur nógv av teimum. Føroya bispur, sum annars ikki er ímóti yvirtøku av fólkakirkjuna, nevnir dømi um kunngerðir, ið ikki enn eru gjørdar ella fullfíggjaðar, so tær kirkjulógirnar, sum tað tók 8 ár at dagføra, kunnu virka eftir ætlan!

Tað átti at verið minsta kravið, at teir trupulleikar, sum liggja og bíða eftir at verða loystir, verða loystir fyrst, áðrenn vit taka á okkum nýggj krøv og skyldur.

### Búskaparligi parturin

Tað skerst ikki burtur, at búskaparligi parturin av fullveldinum/loysingini telur nógv fyri okkum í Sambandsflokkinum, og har valdar stór óvissa.

Lógaruppskotið vísir eisini til Hvítubók í almennu viðmerkingunum, men ein av búskaparfrøðingunum, sum var við til at skriva búskaparliga partin av Hvítubók, hevur skrivað soleiðis í eini grein:

*Tað eigur at verða sligið fast, at »óvissan« skuldi verið yvirskriftin á Hvítubók. Skulu búskaparfrøðingar varðveita umdømi og æru, eigur at verða greitt skilt ímillum tað, sum kann sigast við rímiligari vissu, og tað, sum er púra óvist.*

*Til dømis kann sigast við rímiligari vissu, at »búskapurin minkar«, tá ríkisveitingin hvørvur. Eitt sindur fýrakantað sagt, er hetta tað einasta, sum vissa er um. Hvat ið hendir aftaná, liggur fyri stóran part í mjørka. Men at hetta merkir færrri arbeiðspláss og harav fráflyting, er ongin ivi um. Hetta er so sjálvsagt, at tað nýtist ongin hvítbókabólkur at kanna….*

Hetta er greið tala!

Nógv annað kundi verið skrivað afturat um uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks, ikki minst at tað stendur í viðmerkingunum, at *nú verður trupult hjá donsku stjórnini at sannføra danska skattgjaldaran um framhaldandi heildarveitingar til Føroya.*

Hatta er so satt, sum tað er sagt. Landsstýrið biður so miriliga donsku stjórnina um at skerja veitingina og síðani at taka hana burtur, tað stendur nú svart uppá hvítt! Fer tað at undra nakran, um okkara løgmaður og eins og vara-, fara at skylda uppá danir, tá fíggjarlógin fyri 2002 skal tilevnast og trupulleikarnir fara at vísa seg?

Tað fer ikki at undra okkum í Sambandsflokkinum ! Men vit fara av øllum alvi at berjast ímóti, at teir gera fleiri ólukkur, og tí má andstøðan standa saman í hesum stríði.




Søkt verður eftir

**Handilshøli**

í Runavík.

Skal standa við Heiðavegin og hava góðar parkeringsmøguleikar.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 620

**Nýggjar TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

**FARTELEFONIR**
*GSM - NMT 450*
*Tráðleysar telefonir o. a.*
*Ymisk merki, so sum:*
MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA CONNECTING PEOPLE
SIEMENS
BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

**SKEMT 2000**
**fæst í sølubúðunum kring alt landið**
**Kostnaður 120,-**





**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

www.sosialurin.fo

PF. Restorffs SISU

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg